VIÐMERKINGAR

# Bert fáar almennar útreiðslur eru goldnar

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins*



Tað er ikki óvanligt, at umboð fyri sitandi samgongu lovprísa tí politikki, sum samgongan hevur staðið fyri hesi seinastu 4 árini.

Fleiri av teimum siga bart út, at ongantíð er so nógv hent í einum valskeiði sum hesum.

Vit eru nógv sum dagliga hava fylgt gongdini, og sum ikki eru samd í tí sjónarmiðinum.

Hyggja vit rundanum okkum, so síggja vit, at veruleikin er ein heilt annar.

Bert ein brotpartur av tí, sum samgongan hevur arbeitt við, er sett í verk. Og hóast fíggjarlógin er hækkað eina milliard kr. seinastu 4 árini, so verður tað komandi samgongan, sum má gjalda meginpartin av teimum almennu útreiðslunum, sum eru settar í verk.

Seinni í hesum árinum verður klárt at koyra undir Vestmannasund. Almenna íløgan í arbeiðið er 180 milliónir kr. Av teimum hevur tað almenna goldið 100 milliónir kr. So har resta framvegis 80 milliónir kr. í. Verða tær ikki settar í ætlanina, so verður tað so kostnaðarmikið at ferðast um Vestmannasund, at tað ikki letur seg gera hjá vanligum fólki.

Sáttmáli um at byggja nýggja ferju til Suðuroyarsiglingina, verður undirskrivaður í næstum. Ferjan fer at kosta 310 milliónir kr. Og higartil er einki goldið.

Aftrat Suðuroyarferjuni verður mett, at minst 100 milliónir kr. skulu nýtast til at bøta um havnaviðurskiftini, annars kann ferjan ikki sigla. Eingin króna er enn goldin til endamálið.

Farið er undir at byggja nýtt Landssjúkrahús í Havn. Tað er ein ætlan, sum fer at kosta einar 300 milliónir kr. Higartil er bert fyrsti partur goldin, umleið 60 milliónir kr. Har resta framvegis yvir 200 milliónir kr. í. Samstundis er tað einum og hvørjum greitt, at verandi Landssjúkrahús skal umvælast fyri einar 5-600 milliónir kr. tey næstu árini.

Tingið hevur samtykt at farast skal undir at gera undirsjóvartunnil undir Lorvíksfjørð. Tann ætlanin fer at kosta einar 340 milliónir kr. Av teimum skal tað almenna gjalda einar 240 til 260 milliónir kr., tí bummpengarnir klára ikki at fíggja meir enn 80 til 100 milliónir kr. Eingin króna er enn sett av til arbeiðið.

Hetta eru bert nakrar av teimum íløgunum, sum eru neyðugar í samfelagnum. Og tær vísa, at neyðugt verður við minst 1,5 milliardum kr., um ætlaninar skulu gerast veruleiki.

Vit hava fyri tveimum mánaðum síðani samtykt fíggjarlógina fyri í ár. Hon vísti eitt yvirskot uppá 18 milliónir kr.

Samgongan hevur lagt uppskot um eykajáttanarlóg fyri tingið. Eftir tí økjast útreiðslurnar við 45 milliónum kr. Sostatt er longu talan um undirskot á fíggjarlógini.

Samgongan kvetti 366 milliónir kr. av ríkisveitingini, tí brúk skuldi ikki vera fyri peninginum.

Vit, sum sita í andstøðu, vita fullvæl, at tað hevði verið brúk fyri allari ríkisveitingini og gott og væl tað, um samfelagið skal kallast eitt framkomið samfelag.

Tað eru bert samgongulimir, sum royna at billa fólki nakað annað inn.

Hóast tað ikki sær gott út, so eru vit kortini fús at halda okkum til at gera Føroyar til eitt betri samfelag at liva í.

# Íbúðarneyðin er ein trupulleiki !!!

**Bárður Nielsen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy*



Ein tann fremsta uppgávan hjá eini komandi samgongu er, at loysa stóra íbúðartrupulleikan í landinum, serliga stór er íbúðarneyðin í meginøkinum runt høvuðstaðin. Hetta kemst fyrst og fremst av at flestu arbeiðspláss og útbúgvingarmøguleikar eru har. Íbúðarneyðin í hesum øki er so stór, at prísirnir eru pressaðir so langt upp, at sjálvt fólk við góðari inntøku hava trupuleika at fáa peningin at strekkja til húsarhaldið.

Tey ið ætlað sær eina miðnámsútbúgving, men ikki hava familju ella kenna onkran at búgva hjá í lestrartíðini eru noydd at ferðast millum heimstað og skúla hvønn dag, tí at leiga sær eitt kamar ella íbúð hava tey als ikki ráð til. Heldur ikki ung fólk ið hava verið í útlandinum og fingið sær eina útbúgving síggja seg før fyri at flyta heim aftur á klettarnar, um tey skulu brúka sína útbúgving eru flestu arbeiði í høvuðstaðnum og tey flestu vilja helst búgva tætt við arbeiðsplássi, og skulu tey av við meginpartin av sínari inntøku til húsaleigu ella til rentur og avdrøg um tey velja at keypa sær hús. Hetta er av sonnum ein samfelagstrupuleiki í má loysast, tí at grundarlagið fyri einum framhaldandi vælferðarsamfelag er at hava væl útbúgvi fólk.

Nógv hevur verið tosað um at loysa íbúðarneyðina, men enn er ikki komið nakran veg, hóast so at onkur hevur roynt, men her hava landsins myndugleikar lagt forðingar í vegin. Hettar má ikki halda áfram og myndugleikarnir eiga heldur at stuðla einhvørjari ætlan í kann betra um bústaðarmøguleikarnar soleiðis at samsvar verður millum útboð og eftirspurning, soleiðis at prísstøði verður á einum rímiligum støði.

Ein møguleiki at bøtt uppá hesi viðurskifti hevði verið at givið tilkomnum fólki, har børnini eru flutt heimanífrá møguleika at keypa sær eina minni eigaraíbúð, bygt fleiri eldraíbúðir ella røktar- og ellisheim, og soleiðis bæði loyst trupulleikan við manglandi eldrarøkt og hjálpt barnafamiljunum samstundis. Ein annar møguleiki hevði verið at lagt nøkur almenn arbeiðspláss út um landi soleiðis at trýsti á íbúðum í høvuðstaðnum ikki var so stórt sum nú. At tað gerst dýrari at reka almenna sektorin um arbeiðsplássini verða løgd út um landi eru bert pástandir. Eg eri vísur í at tað ikki hevði verið dýrari at rikið Almannastovuna um hon øll sum hon var bleiv flutt úr høvuðstaðnum.

# Ein betri fólkaskúla

**Rasmus Niclasen**

Framtíð Føroya eru børnini og tey ungu, tí setir javnaðarflokkurin sær fyri at loysa teir trupulleikar, ið eru innan skúlaverkið.

Fólkaskúlin er ein spegilsmynd av samfelagnum. Hann má laga seg eftir og taka støðu til tær somu avbjóðingar, sum samfelagið annars. Vit liva í einum vitanarsamfelag, sum broytist alla tíðina. Tí er alneyðugt at geva teimum ungu eina holla og fjølbroytta undirvísing, soleiðis at tey gerast før fyri at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum nútíðarsamfelagið setir teimum. Hetta er einans fyrsti liður í eini lívslangari læring, sum má standa øllum í boði. Men skúlin er ikki „gearaður" til hesa avbjóðing sum er. Til tess at náa hesum máli, mugu lærararnir fáa tilboðið eftirútbúgvingar. Í hesum skúlaárinum hevur ongin verulig eftirutbúgving staðið lærarunum í boðið, orsakað av ósemju millum myndugleikarnar og lærarafelagið.

Øllum næmingum eigur at standa í boði eitt virðiligt skúlatilboð. Í dag hevur skúlin onki tilboð til tey, sum av eini ella aðrari orsøk ikki fella innanfyri karmarnar til ‘vanliga’ skúlaundirvísing. Her er neyðugt at veita alternativ tilboð, sum t.d. eftirskúlar ella at geva skúlunum størri játtan, so teir kunnu gera nakað við henda trupulleikan. Vit hava alt ov nógv dømi um næmingar, sum verða trýstir inn í eina skipan, ið teir als ikki hóska til. Um teir á annan hátt ikki megna skúlagongdina, er neyðugt vid øðrvísi pedagogikki og undirvísing.

Skúlabyrjanin hevur alstóran týdning. Ein trygg og góð innskúling lønar seg aftur í seinna enda. Tí skjýtur javnaðarflokkurin upp, at seta næmingamarkið í 1. og 2. fl niður til 18 næmingar. Hetta gevur lærarunum ein betri møguleika at veita øllum næmingunum eitt gott grundarlag fyri teirra framhaldandi skúlagongd. Ein onnur loysn kundi verið, at tveir lærarar vóru um teir stóru byrjannarflokkarnar.

Sum skipanin er í dag, er stórur munur á, hvussu nógvir tímar verða tillutaðir hvørjum skúla. Tímabýtisfrymilin tekur støði í, um talan er um ein ársbýttan ella ikki ársbýttan grundskúla, framhaldsskúla við grundskúla ella uttan grundskúla. Hetta hevur ofta við sær, at mismunur verður gjørdur á skúlunum. Nakrir skúlar kunnu geva næmingunum teir tímar, sum skúlalógin ásetir og aðrir ikki. Serliga eru teir smærru bygdaskúlarnir við sviðið sod. Nú røkist tó fyri, at loysn er í eygsjón í hesum málið, men enn sýnist tó ikki full semja at vera millum partarnar.

At støðan er álvarslig, vísir ein trivnaðarkanning, ið Føroya Lærarafelag hevur gjørt. Har sigur ein stórur partur av lærarunum seg vera minni nøgdar við arbeiðið, enn teir hava verið, og helmingurin umhugsar av álvara at søkja annað starv. Orsøkirnar eru, at broytingar henda alla tíðina, at arbeidstíðin ikki røkkur til, at tann uppalandi uppgávan økist, at virðingin frá almenninginum minkar og at skúlaverkið ikki megnar at taka sær av næmingum við serligum tørvi.

Her eru álvarslig signal úr fólkaskúlanum, sum politiski myndugleikin noyðist at taka støðu til.

# Tunnil undir Lorvíksbygd og hvat so?

**Jógvan E. Joensen**

Hervið eitt lítið hugskot í samband við ætlaðu tunnilsgerð undir Lorvíksbygd.

Eitt av uppskotunum er, at tá vegurin frá tunnlinum, sum skal koma upp onkunstaðni úti á Vík, kemur heim í bygdina, skal ein rundkoyring gerast, áðrenn vegurin stingur seg undir heilt í Fróðasa gerði, undir brekkuni. Hetta er helst á góðari leið, men samb. sama uppskoti skulu norðingar upp at anda í einum rundkoyrsli, eitt stað millum núverandi tunnilsmunna og Statoil-støðina, áðrenn teir aftur stinga seg undir heilt í núverandi tunnli.

Hugskot mítt er, hví ikki lata tunnilin undir bygdini koma saman við núverandi tunnli, einar 30 – 40 m innanvert núverandi tunnilsmunna? Hetta hevði kanska longt tunnilin undir bygdini einar 300 m, men so slap ein frá rundkoyring 2. Eg hugsi ikki lorvíkingar høvdu haft nakað ímóti at nýtt sunnaru rundkoyringina tá teir skuldu av bygdini.

Tann 30 – 40 metra stubbin, sum tá loypur av kann landið leiga áhugaðum til frystigoymslu. Goymslan kann lættliga víðkast um tørvur er á tí.

Kanska vert at umhugsa.



VIÐMERKINGAR

# Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara mótmælir atburði Mentamálastýrisins

Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara vil við hesum boða frá, at vit til fulnar taka undir við blokadu tiltøkum Føroya Lærarafelags. Samstundis mótmæla vit og átala, at Mentamálastýrið nýtir loyniligar blokadubrótarar til at gera uppgávurnar til skrivligu fráfaringarpróvtøkurnar í summar hjá 9. og 10. flokkunum, og sum eru raktar av blokaduni hjá Føroya Lærarafelag.

Vit halda hetta vera dømi um vantandi virðing fyri einum fakfelag, og at henda framferð tykkara á ongan hátt økir um álitið á Mentamálastýrið sum arbeiðsgevara. Takið upp annan tátt og haldið tykkum til tilmælið, sum varð gjørt millum partarnar 30.04.2000.

Yrkisfelagið vil eisini gera greitt, at vit nokta limum okkara, at taka upp arbeiði, sum er rakt av blokadu Føroya Lærarafelags.

Avrit av hesum brævi er sent fjølmiðlunum.

Vinarliga

**YF-stýrið**

Pensjónsábøtur:

# Samhaldsfasti er trygga, skjóta og rættvísa loysnin

**Bergur P. Dam**
*Valevni Javnaðarfloiksins í Suðurstreymoy*



Ein ferfalding av útgjaldinum úr samhaldsfasta verður høvuðstátturin í pensjónshækkingunum, kemur Javnaðarflokkurin í samgongu eftir valið.

Áhaldandi hava vit í Javnaðarflokkinum víst á, at ein nýggj pensjónsskipan, ið er grundað á eina dubbing av samhaldsfasta, er ein serføroysk loysn, sum beinanvegin fer at virka. Við hesi fáa allir pensjónistar eina góða inntøku, sum kann tryggja teimum ta sømuligu pensjónistatilveru, sum tey hava uppiborið. Og tá tað kemur til fíggingina, verða tað breiðastu herðarnir, sum berða meira.

Allar hinar skipaninar - og ikki minst tær, sum sitandi borgarliga samgonga hevur arbeitt við - eru eyðkendar við at tær koma ikki at merkjast fyrr enn um eini 40 ár og at útgjaldið verður eftir, hvussu nógv tú megnaði at gjalda inn, meðan tú vart virkin á arbeiðsmarknaðinum. Also skulu inntøkumunirnir varveitast og økjast í pensjónsárunum. Onkur av borgarligu flokkunum - serliga Tjóðveldisflokkurin - hevur skotið upp at endurreisa fátækrahjálpina fyri tey, sum ikki megnaðu at vera við, tá inngjøldini fullu.

**So skjótt**

Útgjøldini úr samhaldsfasta eru fyrst og fremst tengd at inngjøldunum. Beinanvegin sum inngjøldini økjast, sæst tað aftur í útgjøldunum. Í løtuni gjalda løntakarar og arbeiðsevarar hvør sítt hálva prosent til samhaldsfasta. Hetta gevur eitt útgjald á umleið 650 kr um mánaðin. Verða inngjøldini eftir fýra árum økt til tvey prosent frá hvørjum, verða útgjøldini samsvarandi hækkað til áleið 2600 kr um mánaðin. Pensjónistarnir skulu sostatt ikki bíða í upp til 40 ár eftir arbeiðsmarknaðarpensjónini.

**Fyri øll**

Tá gjaldast skal úr samhaldsfasta, verður ikki spurt nær og hvussu nógv tú hevur goldið inn. Allir føroyingar eiga rættin at fáa gjald úr samhaldsfasta. Eisini tey, sum annars ikki vóru ment at gjalda nóg nógv inn í árunum undan pensjónsaldrinum, til at fíggja eina persónliga eftirløn. Hetta tí tey kanska ikki vóru arbeiðsfør, ella tey kanska ikki høvdu lønarbeiði. Men eisini ein stórur partur av teim tímaløntu, við skiftandi arbeiði, hevði verið í hesi støðu.

Og øll fáa somu upphædd úr samhaldsfasta, líka mikið, hvussu nógv ella hvussu lítið tey hava goldið inn. Tað er jú tí tað eitur samhaldsfasti.

**Øll, sum kunna, gjalda**

Meðan aðrar pensjónsskipanir annahvørt eru fíggjaðar av skatti ella persónligum inngjaldi, er samhaldsfasti fíggjaður av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Skattafíggjaðar skipanir eru eyðkendar av, at tað fyrst og fremst eru løntakaranir, sum bera byrðarnar. Meginparturin av skattainntøkuni er lønarskattur - vinna og arbeiðsgevarar rinda lutfalsliga lítlan part av samlaða skattinum. Persónligar tryggingar eru eyðkendar av, at tað fyrst og fremst eru tey, sum vinna nógv, ið megna at verða við.

Men høvuðsinntøkan hjá samhaldsfasta er arbeiðsmarknaðargjald. Tað merkir, at hvørja ferð ein løn verður útgoldin, rindar arbeiðsgevarin somu upphædd sum løntakarin til samhaldsfasta. Fyri løntakaran merkir tað, at samhaldsfasti er meira enn helvtina so bíligur sum aðrar loysnir.

**Ein ódýr skipan**

Júst tí samhaldsfasti er so einfaldur í sínum bygnaði, er hann eisini tann besta loysnin, tá tað snýr seg um umsiting. Skipanin er so einføld, at hon krevur lítla og onga umsiting. Við øðrum orðum: alt inngjaldið fer óskert til eftirløn, meðan aðrar skipanir skulu fíggja eitt yvirskot í eini fyritøku og/ella løna eini stórari umsiting.

**Samhaldsfasti er her**

Í fýra ár hevur henda samgonga bølst oman á eini pensjónsskipan. Endamálið vóru tey samd um: fótur skuldi setast fyri solidarisku skipanini og ein skipan, sum knæsetir klassamunirnar skuldi setast á stovn. Men heldur ikki á hesum øki megnaðu tey at seta nakað í verk. Og kanska var tað bara gott, tí so fingu tey ikki stovnsett ætlaðu asosialu skipanina.

Men samhaldsfasti er her - tað einasta, ið krevst er ein dubbing av skipanini. Veðrur inngjaldið eftir fýra árum sett upp í tvey prosent frá hvørjum parti á arbeiðsmarknaðinum, verður útgjaldið eisini so stórt, at vit røkka málinum um 10.000 kr til hvønn stakan pensjónist, um fólkapensjónin bert verður hækkað við 400 kr. Hetta er ein einføld, trygg og skjót loysn, sum Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri at fremja - og sum vit halda fast um.

# Til leiðsluna í javnaðarflokkinum

**Páll Poulsen**
*Valevni, Sambandsfloksins Norðstreymoy*



**Ríkisfelagsskap ella loysing.**

Eftir valið 30. apríl skal veljast landsstýri, tí soljóðandi spurningur til Javnaðarflokkin. Hvørjum ynskir Javnaðarflokkurin at samarbeiða við eftir valið? - hetta skyldar hann veljara sínum, at koma fram við innan valdagin 30. apríl. Tí - veljarin situr við lyklinum til nýggja samgongu.

Gott val!

# Hvussu ávirkar sølan av Føroya Banka okkara búskap?

**Súsanna Dam**



Íalt ein og ein hálv milliard krónur er virðið á partabrøvunum. Hvussu nógv fara føroyingar at keypa? Restin skal so seljast uttanlands.

Hetta merkir at uttanlandskuld okkara veksur við virðinum av hvørjum einasta partabrævi, selt verður, umframt at hon eisini er hækkað við tí, ið longu er selt, t.d. í alivinnuni.

# Røktarheim skulu byggjast

**Joan Ziskason**
*www.jozi@post.olivant.fo*



-Tey eldru, sum eru vorðin veik og sjúk, eiga rætt til nøktandi hjálp og stuðul.

Tey næstu 4 árini skulu røktarheim byggjast, sum geva pláss fyri umleið160 røktarheimsplássum. Hetta hevur javnaðarflokkurin sett sær sum mál. Landskassans partur av íløguni verður uml. 80 mió. kr. í 4 ár.

Seinasta samgonga hevur svikið tey veiku gomlu, tí hon hevur einki røktarheim bygt. Tað er bæði synd og skomm, at so nógv gomul í okkara samfelag, eru noydd til at sita óhjálpin heima, tí tað ongastaðni er rúm fyri teimum. Hesi hava avgjørt uppiborið eitt betri lív.

Heimahjálparar og heimasjúkrasystrar gera sítt til at hjálpa, men tær eru bara á vitjan í ásettari tíð. Eingin døgnrøkt er. Nógv gomul og sjúk verða løgd í song kl. átta á kvøldið, og síggja ongan aftur fyrrenn kl. átta á morgni.

Fleiri gomul, sum eru veik og sjúk, hava avvarðandi, sum eru um tey. Men at ansa t.d. einum dementum heima er ein slítandi uppgáva, sum ikki er haldbar í longdini. Nógv boygna undan, og fleiri eru noydd at siga lønandi starv frá sær fyri at vera um síni kæru heima. Hetta er ein støða, sum javnaðarflokkurin slettis ikki kann góðtaka og tí er ætlanin at útvega meiri enn hálvtannað hundrað røktarheimspláss tað fremsta í skrá javnaðarfloksins.

## Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*